Hósdagur

Dimmalætting

»Okkara Gulu«

Nr. 203 • 119. árgangur • 5. desember 1996 • Tlf. 11212 • Fax 10941 • e-mail: dimma@olivant.fo

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

7 kr.

Borgarstjórarnir vunnu kommunuvalið 1996

Mynd: Kalmar

Tað loysir seg eftir øllum at døma at sita við valdinum, eisini í ringum tíðum. Um alt landið fingu borgarstjórarnir goð val

Tað voru serliga borgarstjórarnir og samgongurnar kring um í teimum stóru kommununum, sum komu væl frá valinum hesaferð. Hóast allar kommunur nærum bert hava spart seinastu fýra árini, og ikki hava havt orku at setta stórvegis í gongd.

Tórshavn

Lisbeth L. Petersen og Sambandsflokkurin saman við Javnaðarflokkinum gjørdust teir stóru sigursharrarnir.

Sambandsflokkurin fekk við seinasta val 1542 atkvøður, og Lisbeth L. Petersen fekk tá 790 personligar.

Hesaferð fekk Sambandsflokkurin 1890 atkvøður og Lisbeth L. Petersen 1007 personligar. Tað gav fýra umboð, sum er eitt afturat. So frøin var stór í ítróttarhøllini á Hálsi. Hinir samgonguflokkarnir varðveittu sín umboð, so samanlagt fekk samgongan ein afturat.

Klaksvík

Jógvan við Keldu og Fólkaflokkurin vann valið í Klaksvík.

Fólkaflokkurin fekk við seinasta val 895 atkvøður, harav átti Jógvan við Keldu 345 atkvøður.

Hesaferð fekk Fólkaflokkurin 906 atkvøður, harav átti Jógvan við Keldu 335 atkvøður, ella at kalla tríðingin av atkvøðunum.

Tvøroyri

Á Tvøroyri gjørdist valið serliga spennandi í ár. Allir flokkarnir í samgongunni høvdu tikið seg saman móti javnaðarlistanum.

Samgongan fekk við seinasta val 650 atkvøður. Hesaferð fekk hann nakað færri, 519 atkvøður, men varðveitti meirilutan.

Stóri sigursharrin gjørdist býráðsformaðurin Páll Vang, sum við seinasta val fekk 37 personligar atkvøður. Hesaferð fekk hann heilar 166, og kom harvið eisini framum -toppskoraran- við tey undanfarnu valini, Sverra Midjord, sum fekk 150 personligar atkvøður.

Runavík, Fuglafjørður og Vágur

Eisini í Runavík fekk listin hjá býráðsformanninum góða undirtøku. Listin frá 1992 er farin í tvíningar, men listin hjá Jákup Lamhauge vann. Og personliga gjørdist valið eitt rættiligt hál. Seinast fekk hann 96 personligar atkvøður. Hesaferð var talið 208.

Í Fuglafirði var tað eisini listin hjá býráðsformanninum sum fekk eitt gott val. Sigfriður Vørðhamar fekk 138 atkvøður móti 76 við seinasta val.

Og í Vági var tað listi E hjá Jógvani Krosslá, býráðsformanni, sum strev við sigrinum. Serliga gott gekst personliga – frá 63 atkvøðum í 1992 til 177 atkvøður hesaferð.

Oljufeløgini hava víst á áhugaverdu teigarnar

Útbjóðingarumfarið til veruligar oljuleitingar verður einaferð um ársskiftið 1998/99, men Oljufyrisitingin hevur longu fingið eina ábending um, hvørjir teigar oljufeløgini halda vera áhugaverdar. Freistin hjá feløgunum at koma við tilmælum er úti á middegi í dag.

DIA MIDJORD

Oljuævintyrið nærkast hvønn tann einasta dag. Hóast leingi er at bíða til oljuvinnan av álvara fer í gongd, koma brikkarnir til endaliga puslispælið so hvørt upp á plass.

Á middegi í dag er eitt nú freistin úti hjá oljufeløgunum at koma við tilmælum til Oljufyrisitingina. Tey eru biðin at vísa á, hvørjar teigar tey vilja hava við í fyrsta útbjóðingarumfarinum og hvi.

Um tjúgu oljufeløg

Martin Heinesen, leiðari av Oljufyrisitingini, segði fyrrapartin í gár, at fleiri enn tiggju oljufeløg høvdu víst á teigar, sum tey hildu vera áhugaverdar.

– Tilmælini koma inn alla tíðina, og eg rokni við, at okkurt um tjúgu oljufeløg hava gjørt vart við seg, tá freistin er úti á middegi í morgin, sigur Martin Heinesen.

Ein partur av arbeiðinum hjá Oljuráðleggingarnevndini er at leggja fyri ella tilmæla landsstýrinum, hvørji økið skulu útbjóðast, hvørjar treytir eru o.s.fr. Og tað er í hesum sambandi, at Oljuráðleggingarnevndin hevur loddað dýpið hjá oljufeløgunum.

– Tað voru nógv feløg við í Lopra, so nøkur av feløgunum ganga sjálvandi aftur, men eisini onnur oljufeløg hava latið tilmæli inn, sigur Martin Heinesen.

Ilt at spáa nakað

Leiðarin á Oljufyrisitingini sigur, at tað skal takast við eitt sindur av fyrivarni, tá ført verður fram, at áhugin er stórur.

– Áhugin er stórur á tann hátt, at nógv oljufeløg nú fyrireika seg og hyggja eftir føroyska økinum. Tað er ikki givið, at hesi feløgini fara at at bjóða upp á eina rugvu, tá ið tað veruliga fer at galda, sigur Martin Heinesen.

Hann sigur viðari, at tá útbjóðingarumfarini verða, tá skulu oljufelogini søkja um at faa loyvi til at gera ein stóran innsats á økjunum.

– Ikki fyrr enn tá finna vit utav, hvussu veruligi áhugin er, sigur hann.

Martin leggur aftrat, at í verandi løtu teknar tað gott, tí fitt av feløgum - bæði stór og professionell - hava vist áhuga.

Leiðarin á Oljufyrisitingini, Martin Heinesen, roknar við, at eini tjúgu feløg hava gjørt vart við seg, tá ið freistin er úti á middegi í dag

Jólatrøini verða tendrað

Tvey av jólatrøunum, tað í Havn og tað á Argjum, koma í ár úr Fjerritslev kommunu. Tilsamans verða fimm jólatrø í kommununi tendrað seinnapartin leygardagin.

Leygardagin komandi verða jólatrøini í Tórshavnar Kommunu, Føroya stórsta kommuna, tendrað.

Ikki færri enn fimm jólatrø skulu tendrast henda dagin.

Fyrr var tað so, at Havnin fekk jólatræ sendandi sum jólagávu frá vinarbýi sínum í Danmark, Birkerød. Men hesir báðir býir eru ikki longur bundnir saman í vinarbandi, hóast teir hava sera gott samband hvør við annan.

Eftir at Havnin sagði vinarbýarsambandi sítt upp við Birkerød, hevur býráðið keypt jólatrø úr Birkerød.

Í ár er støðan ein onnur, tá Birkerød hevur ikki eitt einasta stórt jólatræ til sølu, ið hvussu er ikki so stort, sum býráðið yniskar sær.

Heldur ikki hevur borið til at fingið nakað frá norska fyrrverandi vinarbýnum Asker.

Í staðin fekk borgarstjórin í Tórshavnar Kommunu, Lisbeth L. Petersen, fyri nakað sína avtalu við samstarvsfelaga og personliga kenning sín í Fjerritslev kommunu at útvega Havnini jólatrø.

Fjerritslev liggur í Norðurjyllandi, og er hetta juststaðið har fyrrverandi háskulastjórin, Thorben Johannesen, fyri nakað síðani var settur í starv sum prestur.

Væl la fyri at lata Havnini jólatrø. Tað var gamani, og hevur Tórshavnar kommuna fingið tvey stór jólatrø frá Fjerritslev í ár. Annað skal standa í Tinghúsvøllinum og hitt á Argjum.

Tað fyrra verður tendrað kl. 16. leygardagin, har Havnar Hornorkestur fer at spæla jólalog, og rødarnir vera Sverri Steinhólm, prestur, og Lisbeth L. Petersen, borgarstjóri.

Aftanæ at jólatræið er tendrað, uml. kl. 16.30, syngur barnakór á Kata Hornimum.

Seinni leygardagin, kl. 17.30 verður jólatræið í Kaldbak tendrað. Har fer GHM at spæla, og bæði Sverri Steinhólm, prestur, og Lisbeth L. Petersen, borgarsstjóri fara at siga nokur orð.

Leygarkvøldið kl. 19 verður jólatræið á Hvítanesi tendrað. Har fer GHM aftur at spæla jólalog, og Sonja Klein, prestur, og Lisbeth L. Petersen, borgarstjóri, halda røður.

Í Norðradali verður jólatræið tendrað leygardagin kl. 16 GHM spælir, og Høgni Poulsen, prestur, og Heri Trondheim, bygdaráðsformaður, tala.

Kl. 19 um kvøldið verður jólatræið á Argjum tendrað, og har fer GHM aftur at spæla jólalog. Røðarar verða Høgni Poulsen, prestur, og Heri Trondheim, bygdaráðsformaður.

Í BLAÐNUM Í DAG

Brøndby víðari í UEFA Cup við stórsigri móti Karlsruhe

Týsdagin syrgdi danska superligulíðið Brøndby fyri einum av mest óvæntaðu úrslitunum í UEFA Cup-kappingini, tá liðið vann heili 5-0 á útivelli móti tyska Karlsruhe, sum hevði vunnið fyrra dystin 3-1. Sostatt kom Brøndby viðari til fjórðingsfinalurnar.

Ítróttur, síða 4

Fýra síður við valúrslitum

Sum øll helst vita var kommunuval um alt landið tysdagin. Í dag hevur Dimmalætting øll valúrslitini í blaðnum, tilsamans fyra síður.

Síða 6,7,8 og 9

Um hálvan desember má smoltið úr Vatnsnesi

Tað undrar landsstýrismannin við umhvørvismálum, at landsdjóralækninum og Heilsufrøðiliga Starvsstovan hava givið Hera Hjelm undantaksloyvi at flyta smolt í Vatnsnes.

Síða 3

Nú fer skjótt at bera til at búgva á mánanum

Eitt rúmdarfar hjá NASA hevur sent radarasignal niður á jarðina, sum eftir øllum at dømi prógva, at ísur er á mananum. Um so er, halda fleiri, at tað um ikki so nógv ár fer at bera til hjá fólki at búgva uppi á mananum.

Síða 10

PARABOL • PARABOL • PARABOL

FULLFÍGGJAÐ PARABOL-SKIPAN

Skál: 99 cm. D2 MAC satelittmóttakari við 2 kortlesarum. Skál: beslog o.a. úr rustfríum tilfari

NÚ BERT

3.990.-

ELDING

FLOGFERÐA SEDLAR

Faroe Travel

Tlf. 12600

FLOG-FRAKT

Faroe Cargo

Tlf. 18787